# Oddurin aftur opin

**H71 tapti fyri Kyndli, og tó at VÍF og StÍF høvdu trupulleikar, so fylgdu tey bæði við í oddinum, har finalustríði enn einaferð er víðopið**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eingin ivi var um setningin hjá H71, tá teir vitjaðu hjá Kyndli sunnudagin. Við einum sigri í hesum dystinum kundu teir á oddaliðnum mest sum staðfesta finaluplássið. Ein setningur, sum tó ongantíð varð rokkin.

Kyndil setti seg nevnliga á dystin frá byrjan. Eftir fyrstu varisligu løtuna vóru tað teir grønu, sum komu omaná, og tann munin hildu teir allan vegin. Eisini hóast teir seinastu løtuna vístu nakað av H71-kompleksinum, sum tykist hava fingið veruligar fastatøkur á liðnum.

Tvær ferðir í ár hevur Kyndil nevnliga tveitt at síggja til trygga leiðslu burtur, tá teir hava spælt móti H71, og tann søgan mundi endurtikið seg.

Átta minuttir fyri seinasta bríkslið hevði Josef Abrahamsen annars skotið Kyndil á 24-17, og tað átti at verið nóg mikið. Men við hoyvíkingum er einki avgjørt, fyrr enn seinasta bríkslið hevur ljóðað.

Nú teir mest sum einki høvdu at stríðast fyri - annað enn æruna – kom brádliga glið á spælið. Kanska slappaði Kyndil eisini av, ella kanska var tað byrjandi panikkur, sum fór at gera um seg. Undir øllum umstøðum, so fóru hoyvíkingarnir nú at eta seg inn á teir grønu. At tvey grøn brotskøst eisini vórðu misnýtt hesa løtuna, gjørdi ikki støðuna minni spenanndi. Og tá Sigtór Andreasen 30 sekund fyri leiklok minkaði munin í eitt mál, var høllin á gosi.

Kyndil megnaði tó at halda høvdið kalt seinastu løtuna. Álop varð koyrt róliga runt, og tá hoyvíkarverjan kom út at trýstað, varð bólturin sleptur inn til ískalda Janus Einar Sørensen, sum soleiðis staðfesti týdnignarmikla sigurin.

### Favorittar í trupulleikum

Í hinum báðum mansdystunum um vikuskiftið, vóru VÍF og StÍF í stórum trupulleikum móti liðum, sum á pappírinum ikki skuldu volt teir stóru trupulleikarnar.

Í Vestmanna kom KÍF soleiðis á odda 19-18, tá tíggju minuttir vóru eftir, men so slerdi VÍF turbona til.

Við fimm málum á rað punkteraðu teir dystin, soleiðis at stigini kortini komu til høldar í hampuliga tryggum stíli.

Og á Skála var eisini um reppið, at StÍF heilkiksaði.

Talan tóktist annars vera um tryggan sigur, tá StÍF seks minuttir fyri dystarlok økti til 28-24, men so steðgaði púrasta upp. Upp á tríggjar minuttir skeyt Neistin trý mál, og so stóð nógv á seinastu minuttirnar. Mál kom tó einki afturat, og tí kundu heimaáskoðaranrir draga andan nakað lættari, tá seinasta bríkslið hevði ljóðað.

Men meira enn nakað, so undirstrikaði dysturin, at einki eigur at verað tikið fyri givið. StÍF er higartil einaseta oddaliðið, sum hevur snávað móti teimum niðaru. Enn hanga teir kortini í, men ráð eru ikki til fleiri svipsarar.



*Hoyvíkingarnir royndu at stríðst, men tað var tó til fánýtis sunnudagin*
*Mynd: Álvur*

## FAKTA

**Kyndil-H71 25-23 (13-9)**
Málskjúttar
Kyndil: Høgni Klein 9(2), Rókur Akralíð 5, Hans Áki Dal Christansen 3, Josef Abrahamsen 2, Hjalti M. Jacobsen 2, Janus Einar Sørensen 2, Ragnar Stakksund 11
H71: Halgir Dahl Olesen 9(1), Sigtór Andreasen 4, Piti Negru 4, Tróndur Vatnhamar 3, Jakob Jónsson 1, Bjarni Sørensen 1, Niels Viggo Niclasen 1
Brotskøst: Kyndil 4, H71 1
Útvísingar: Kyndil 4, H71 5
Dómarar: Dánjal Samuelsen & Kristian Johansen.

**StÍF-Neistin 28-27 (15-13)**
Málskjúttar
StÍF: Sveinur Justinussen 9, Bárður Danielsen 6, Alexandur Johansen 5(3), Bent Djurhuus 3, Artur Johansen 3, Jon Rasmussen 1, Jørmund Joensen 1
Neistin: Blagoje Buha 6, Áki mørk 4(1), Tróndur Kragesteen 4, Rani Slættanes 3, Karl Oddmar Rasmussen 3, Karl Herup Olsen 3, Birgir Poulsen 2, Jens Mohr 2
Brotskøst: StÍF 5, Neistin 2
Útvísingar: StÍF 4, Neistin 5
Diskvalifikatión: StÍF 1 (3X2 minuttir)
Dómarar: Petur S. Dahl & Hallur Danielsen.

**VÍF-KÍF 26-21 (12-9)**
Málskjúttar
VÍF: Agnar Joensen 6, Harald Bjørgvin 4, Ingi Olsen 4, Regin Joensen 4, Áki Olsen 3, Sámal Joensen 2, John Zachariassen 2, Rói Lamhauge 1
KÍF: Petur Martin Poulsen 5, Karl Johan Djurhuus 5(2), Gert Hansen 4(1), Mirko Milenkovic 3, Arnbjørn Hansen 2(1), Damir Oros 2
Brotskøst: VÍF 1, KÍF 9
Útvísingar: VÍF 3, KÍF 2
Dómarar: Rúni Mohr & Hartivg Joensen

# Favorittarnir koppaðu

**Fyri aðru ferð í ár vunnu Kyndils-kvinnur á favorittunum. Hesa ferð var tað VB, sum mátti geva skarvin yvir. Og í Klaksvík fekk Stjørnan ikki hevnd fyri finalutapið**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kyndil hevur fyri tað nógva verið mett sum ein avgreiðsluspurrningur í FM-endaspælinum í bestu kvinnudeildini. Eitt postulat, sum tær alla tíðina hava stríðst ímóti, hóast eingi stig vóru komin á kontina. Eitt nú við einum sera jøvnum dysti móti Neistanum, sum akkurát megnaði at knógva grannunum.

Og sunnudagin bar loksins til aftur. Hóast VB var liðið, sum byrjaði dystin betri, so megnaðu tær ikki at halda fast um yvirvágina. Kyndil stríddist manniliga, og tá farið varð til hálvleiks, høvdu tær vunnið seg aftur upp á javnt.

Eftir steðgin tóktist sama gondg at gera seg galdandi. Men seinastu løtuna koppaði dysturin fullkomuliga. VB hevur fyrr í ár havt trupulleikar av tunna hópinum, sum ikki megnar at spæla heiilan dyst við fullari ferð. Og tann veruleikin varð aftur staðfestur. Kyndil slapp framum, tá lítið korter var eftir at spæla, og so misti VB luftina. Og so var fagnaðurin stórur hjá teimum grønu, sum við hesum staðfestu, at tær ikki bara skulu roknast sum ein møgulig prügelknäbe í FM-bólkinum.



*Kyndil hevði ongan hug at bakka fyri VB, sum mátti stigaleyst úr høvuðsstaðnum* *Mynd: Álvur*

Í Klaksvík hevði Stjørnan vitjan av Neistanum, og her var setningurin sjálvandi at hevna ósigurin frá steypafinaluni. Ta ferðina var Manuela Stan Jensen stóri spælarin, og tað var hon aftur í Klaksvík leygardagin.

Stjørnan hevði ananrs leiðsluna størsta partin av dystinum. Og góðar 10 minuttir fyri leiklok stóð 17-13 á talvuni. Neistin misti um sama mundið Unn Kragesteen, sum fekk reytt kort, so tað skuldi ligið væl fyri hjá Stjørnuni. Men tær høvdu gloymt Manuelu.

Hon snøgt sagt læsti málið, og spakuliga vann Neistin seg aftur. Tríggjar minuttir fyri leiklok høvdu tær vunnið seg framum, men við tveimum spælarum í undirtali tóktist uppgávan framvegis møtumikil. Men aftur hesa ferð hildu tær kortini búrið reint hesa kritisku løtuna, og tá Manuela so fyri sættu ferð av seks møguligum vardi fyri brotskasti, var leyst og liðugt. Stjørnan má ásanna, at tað hjá teimum helst verður um hálvfinalur móti VB, meðan Neistin fekk prógvað, at steypasigurin avgjørt ikki bara var grundaður á hepni.

## FAKTA

**Kyndil-VB 23-18 (9-9)**
Málskjúttar
Kyndil: Lina Andriulyte 10(3), Jórun S. Ludvig 4, Randi S. Wardum 4, Anja Heinadóttir 2, Ronja Mikkelsen 2, Hildur Høghamar 1
VB: Daiva Toumaite 9(3), Gurið Mortensen 4(1), Monika Samuelsen 2, Mryna Zylko 2, Jóna Thorsteinsson 1, Una Egilsdóttir 1
Brotskøst: Kyndil 3, VB 8
Útvísignar: Kyndil 1, VB 3
Dómarar: Kristian Johansen & Dánjal Samuelsen.

**Stjørnan-Neistin 17-18 (11-9)**
Málskjúttar
Stjørnan: Anna Kristina Samson 5, Una Olsen 4, Louisa Andreasen 3, Durita Christoffersen 2, Alina Olaru 2, Bára S. Klakstein 1
Neistin: Nicoleta R. Hansen 5, Ása á Neystabø 4(1), Annika Thomsen 3, Katrin á Neystabø 2, Mildrið Jacobsen 1, Kára á Dunga 1, Anna Clementsen 1, Unn Kragesteen 1
Brotskøst: Stjørnan 6, Neistin 2
Útvísingar: Stjørnan 3, Neistin 6
Diskvalifikatión: Neistin 1 (Beinleiðis reytt)